## Danmark fyrimun

Eins deyð, annans breyð sigur tað gamla orðafellið. Soleiðis verður tað eisini við veðurlagsbroytingunum, og sambært granskarum verður Danmark eitt av teimum londunum, sum fáa fíggjarligt gagn av broytingunum. Granskararnir hava roknað seg fram til, at í meðal verður tað millum 0,6 og 2,5 stig lýggjari í Skandinavia um eini 15 ár og millum 1,7 og 3,8 stiog lýggjari í 2050 enn nú. Samstundis vísa granskararnir á, at meðalhitin í Danmark er longu nú 1,5 stig oman fyri meðalhitan í 1870'unum. Umframt meiri hita vænta granskararnir minni avfall í Danmark, og samanumtikið verður veðrið í Danmark, soleiðis sum tað er í Norðurfraklandi nú. Tað fer at gagna Danmark, siga granskararnir.



## Færri ferðafólk til Grønlands

Ferðavinnan í Grønlandi hevur fingið sviðan av altjóða fíggjarkreppuni, men grønlendska ferðavinnu- og vinnuráðið arbeiðir við at finna hugskot, sum kunnu avmarka avleiðingarnar, sigur kringvarpið KNR. Hagtølini vísa eisini, at okkurt má gerast. Í fjør vitjaðu meiri enn 57.000 útlendsk ferðafólk Grønland, og tey seinastu hagtølini vísa, at talið verður næstan 7.000 minni í ár, sigur KNR. Tølini vísa, at tað eru serliga tey, sum ferðast loftvegis, ið fækka í talið, meðan talið á teimum, sum vitja Grønland við teimum stóru ferðamannaskipunum, eru ikki so nógv færri í ár enn í fjør.



*Torgið í Vágsbotni var stúgvandi fult av fólki, tá Mr. Rockn'n Roll himself trein út á pallin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Tá Pál kemur á mál

Eg tori ikki eg dugi ikki eg klári ikki eg veit heldur ikki hvat hini fara at **siga** so best mann vera at **tiga** og **biðja** um stuðul og hjálp tí áh her er so ringt **skil** tað ber ikki **til** vit hava alt for stuttan **hyl** bara 25 **metir** tað er sum at hava **ketir** við **steini** um **beini** um eg so venji bæði summar og **vetir** blíva hinir **betir.** Ja, soleiðis kann mann **grenja** - men mann kann eisini fara at **venja** og vísa vilja og **mót** og harður sum **grót** bara kava útí og skíta á **rest** tí mann veit at mann er **best**! So lat meg siga eitt við **tey** sum kæra sína **neyð** og minna mest um **seyð** sum tey gráta um sítt **breyð** - mann kann eisini liva lívið the rock'n'roll **way**!

Tað hoyrist **skrál**
frá hvørji **sál**
tá ið **Pál**
kemur á **mál**
(Hann er á **mál**)
nei har er einki **drál**,
hann vísir teimum bæði brand og **bál**

It **sucks** og it **fucks** at fólk ganga uppí idiotiskt **koks** og **roks** sum sítt hár**voks** og sínar dread**locks** - tað er bara eitt sum really **rocks**: far suður til **Vágs**! Har býr ein maður sum er coolur sum ein frysti**boks** tí tá Pál fer **stroks** tá er tað einki **roks.** Hann svimir móti **streyminum**, hann fylgir **dreyminum**, bringu ella **crawl** tað er rock'n'**roll** tá hann **tak** fyri **tak** og coolur sum eitt kava**blak** leggur allar hinar afturum **bak** og vinnur við eitt **brak** sum var tað lættasta **sak.** Tað eru for nógv sum eru **full** av sínum egna nalva og síni lumma**ull** - men tá Pál vinnur **gull** tá er tað rock og **rull**!

Tað hoyrist **skrál**
frá hvørji **sál**
tá ið **Pál**
kemur á **mál**
(Hann er á **mál**)
nei har er einki **drál**,
hann vísir teimum bæði brand og **bál**

Orð: Kári Cool
Lag: Kim Hansen
Upptøka/ljóðblanding: James Olsen

hevði hann bitið í lort - hann visti ikki hvat annað, hann skuldi spyrja um.

Men karrieran hjá Bjørn Borg endaði ikki - hann gjørdist tann besti tennisspælarin nakrantíð!

Bjørn Borg var cool. Hann var ikki sum tey flestu. Hann var ikki sum tey sum ganga dølsk runt og minna mest um seyð - hann livdi lívið the rock'n'roll way.

Tað hava tað verið nógv sum hava gjørt í Føroyum. Vit hava átt eina sublima trio: Nólsoyar Páll, Magnus Heinason og Guttorm í fuckin' Múla!

Men tað eru eisini nógv fólk í Føroyum í dag sum rykkja hegnpelar upp. Sum bróta garðar niður. Sum spreingja múrar. Sum víðka mørkini fyri hvat tey kunnu og skulu - og víðka mørkini fyri hvat onnur kunnu og skulu.

So tað vóru fleiri kandidatar, tá ársins rock'n'rollari skuldi finnast.

Men hvussu eg so shakaði krukkuna við nøvnum, so var tað altíð eitt, sum endaði ovast.

Tí tað er ein maður sum hevur sett sær so høg mál á sínum øki, sum tað yvirhøvur ber til at seta sær. Ein maður sum hvønn tann einasta ein dag arbeiðir hart og miðvíst fram ímóti sínum stóra máli.

Hann livir við teimum trongu fysisku kørmunum í Føroyum, og fær optimalt burturúr teimum. Og hann sprongir teir trongu mentalu karmarnar í Føroyum. Karmarnar sum seta mørk fyri, hvat mann kann og skal, og hvat mann ikki kann og skal.

Tað sveið illa tá okkurt kiksaði undir 800 metrinum í HM í Rom í gjár - men tað steðgar honum ikki, tí hansara rock'n'roll spirit er líka kompromisleys sum altíð. Og tað er the spirit - tað er hugburðurin - sum ger munin millum tey, sum minna um seyð, og tey, sum liva the rock'n'roll way.

Tað er ein persónur í Føroyum sum fram um nakran hevur víst the rock'n'roll spirit í ár, og tað er Pál fuckin' Joensen!

Og so er tað, at eg skuldi halda eini talu fyri Pál. Fuck. Prædikur eru fyri prestar, talur eru fyri politikarar - rockarar spæla rock. Og í fær Pál onga talu her í kvøld - hann fær ein rock'n'sang. Hann kallast sjálvandi: Tá Pál kemur á mál.